# **Radiohandilin** er bæði handil og verkstað

**Radiohandilin í Miðbýnum í Havn selur tól og útgerð, ið hoyrur slíkum handli til, men umframt er verkstað knýtt at handlinum, og leggja tey stóran dent á góða tænanstu**

## HANDIL

Radiohandilin byrjaði í ringastu krepputíðum í 1992. Brøðurnir Echardt og Pole Persson eru báðir útbúnir á verkstaðnum í radiohandlinum hjá S.H.J., ið tá var.

Nýggja Radiohandilin byrjaðu teir í hølum í Handilskjarnanum, men fluttu so í hølini hjá Sam Olsen í Miðbýnum, men so brunnu hesi húsini í grund umleið 1995, og so fóru teir oman aftur í Handilskjarnan eina tíð. Tá hini húsini so vóru bygd uppaftur eftir eldsbrunan, fóru teir har at vera, og eru teir har enn.

## Verkstað og service

Radiohandilin selur sjónvørp, hi-fi tól, GPS'arar, og annars útgerð og tól, ið hoyra slíkum handli til.

Umframt hava teir verkstað, og leggja stóran dent á tænastu og service.

Eini 9 fólk eru knýtt at fyritøkuni.

## Hava merkt kreppur

Í Radiohandlinum verður sagt, at versnandi tíðirnar sjálvsagt merkjast, og at neyvan nakar kann siga annað, tí innflutningtølini tala fyri seg.

Men sum teir skemtandi – og tó við sorgblídni – vísa á, so nýtist teimum ikki kreppuhjálp, tí teir hava sanniliga merkt kreppur áður, og sipa teir eittnú til byrjanina í tungu kreppuárunum og niðurbrunnin hús.

Brøðurnir Echardt og Pole Persson eiga og reka Radiohandilin.














